FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

**Fundarfrágreiðing frá stýrisfundi 23. september 2013:**

| | |
|---|---|
| **Dagur og klokkutíð**: | Mánadagur 23. september 2013 |
| **Fundarstaður**: | KT- deildin, J.C. Svabos gøta 7 |
| **Til staðar**: | Herálvur Joensen, stýrisformaður, Jan Mortensen, næstformaður, Vibeke Michaelsdóttir, Sára Joensen, Gestur Hovgaard, Tove Bull, Juanna Joensen (umvegis skype, var við seinnu helvt av fundinum), stýrislimir, Sigurð í Jákupsstovu, rektari og Jørgen Meitilberg, fyrisitingarstjóri |

---

Stýrisformaðurin bjóðaði vælkomin.

1. **Góðkenning av fundarfrágreiðing 2/2013**

Fundarfrágreiðingin varð góðkend.

a. **Mannagongd viðvíkjandi stýrisfrágreiðingum**

Fundarfrágreiðingin skal sendast stýrislimunum til viðmerkingar skjótast gjørligt eftir fundin, soleiðis at frágreiðingin er avgreidd innan eina viku.

Frágreiðingarnar skulu vera meira ítøkiligar og greitt endurgeva niðurstøður, sum verða tiknar á stýrisfundinum. Samstundis skulu frágreiðingarnar endurgeva málini soleiðis, at uttanfyristandandi kunnu fylgja við í stýrisarbeiðinum.

2. **Fíggjarstøðan 2013**

Raksturin fram til august vísir, at hallið er um eina millión.

Tað verður ein avbjóðing at fáa raksturin at halda seg innan fyri játtanarkarmin. Setrið merkir av álvara skerjingina av játtanini á 1.545 t.kr. í mun til játtanina í fjør.

Neyðugt verður at halda aftur við øllum útreiðslum, og Setrið eigur at síggja til at fáa fleiri inntøkur í raksturin.

Neyvari framskrivingar verða gjørdar av útreiðslunum og inntøkunum, tað sum eftir er av fíggjarárinum.

Dekanarnir hava fingið boð um at spara 20% á framskrivaðu játtanini til keyp av vørum og tænastum restina av árinum. Við sparingum og inntøkum, ið enn ikki eru inntøkuførdar, eru útlit fyri, at Setrið kann halda játtanina fyri 2013.

## 3. Uppskot til fíggjarætlan 2014 – umrøða

Fíggjartørvurin hjá Fróðskaparsetri Føroya fyri fíggjarárið 2014 er mettur til at verða áljóðandi 82.242 t.kr.

Høvuðsatlitini, fyri at neyðugt er við hægri játtan, eru hesi:

1. **Uppstiging av undirvísarum:** Sambært løgtingslóg um virksemi Fróðskaparsetursins er ásett, at Setrið skal veita granskingargrundaða frálæru á hægsta altjóða stigi. Tí er neyðugt hjá fleiri av okkara lærarum og námslektarum at nema sær granskingarførleika, í flestum førum við at nema sær ph.d. útbúgving. Harumframt verða fyribilsstørv, tá hesi ganga út, endursett sum granskarastørv.

2. **Innanhýsis góðskutrygging:** Setrið fer undir at menna eina innanhýsis góðskutryggingarskipan til tess at skjalfesta og eftirmeta útbúgvingardygdina. Hetta arbeiðið er neyðugt fyri at Setrið kann lata seg eftirmeta av uttanhýsis serfrøði, pkt. 3.

3. **Fyrireiking til uttanhýsis eftirmeting:** Fróðskaparsetur Føroya skal eftirmetast í fíggjarárinum 2014. Til hetta krevst stórt fyrireikingararbeiði á Setrinum til tess at fáa til vega neyðugar mannagongdir og skjalfestingar. Tað verður neyðugt í hesum sambandi at finna eyka arbeiðsorku til hetta arbeiðið.

4. **Betri stuðulstænastur:** Havandi í huga at talið av lesandi er munandi økt seinastu árini, verður lagt upp fyri at víðka um tænastustøðið til tey lesandi, við at seta á stovn eina lestrarstovu (studiekontór). Hetta er ein alneyðug tænasta innan hægri lesnað; ein tænasta, sum Setrið við verandi orku ikki klárar at veita í dag. Neyðugt verður at seta tvey ársverk at taka sær hesi uppgávu.

5. **Nýggjar útbúgvingar:** Setrið arbeiðir við at tryggja fleiri lesandi pláss til hægri lestur í Føroyum. Í fyrstu syftu verður hetta gjørt við at vit bjóða allar útbúgvingar út hvørt ár. Í dag er tað soleiðis, at útbúgvingarnar á Náttúrurvísindadeildini bert verða bodnar út annað hvørt ár. Í øðrum lagi verður arbeitt við at menna fleiri nýggjar útbúgvingar.

Samanumtikið má staðfestast, at um Setrið skal liva upp til ásetingarnar um at veita granskingargrundaða undirvísing á øllum útbúgvingum og at tryggja útbúgvingardygdina sambært lóg og altjóða ásetingum, so er neyðugt við meirjáttan til granskarastørv og til stuðulstænastur.
Til tess at bjóða nýggjar útbúgvingar út, má hóskandi játtan setast av til gransking og undirvísing.
Hølini hjá Setrinum eru trong og ótíðarhóskandi. Vaksandi tal av lesandi ber við sær øktan hølistørv.

Setursskrivstovan eigur at vera meira proaktivt tá tað snýr seg um at lata fíggjarætlan til Mentamálaráðið. Við hesum fær Setrið arbeitt við fíggjarætlanini nakað áðrenn ráðið heitir á Setrið um at útvega ráðnum uppskot til fíggjarætlan.

## 4. Skriv frá starvsfólki á Námsvísindadeildini

Viðgjørt saman við pkt. 6

## 5. Skriv frá starvsfólki á SFD

Viðgjørt saman við pkt. 6.

## 6. Status bygnaðarbroytingar

Starvsfólk á SFD og á Námsvísindadeildini hava sent stýrinum skriv. Skrivini eru ymisk, men snúgva seg í báðum førum um bygnað, heimildir, mannagongdir o.s.fr. Av tí at leiðslan um somu tíð hevur sent út skriv um ætlaðar bygnaðarbroytingar, vóru skrivini frá deildunum viðgjørd í hesum høpinum. Stýrið tekur slík skriv í álvara og fer at svara deildunum. Samstundis hevur stýrið heitt á leiðsluna um beinanvegin at samskifta við deildirnar um viðurskifti, ið kunnu hava elvt til misnøgd ella misskiljingar. Fundir eru longu avtalaðir við deildirnar og vónandi kunnu ivamál í sambandi við nýggja bygnaðin verða greidd.

Yvirskipað kann sigast, at stýrið er einmælt um ta støðu, at tað ikki verða skipaðar fleiri enn tvær megindeildir á Fróðskaparsetri Føroya. Somuleiðis er semja um, at skipan við útbúgvingarleiðarum, lestrarráðum og styrktum deildarskrivstovum eigur at verða roynd. Tað er leiðslan, ið hevur ábyrgd fyri at seta skipanina í verk og í hesum sambandi eisini meta um, hvørt tað er munur millum deildirnar, ið kann rættvísgera at lagt verður upp fyri serligum umstøðum í ávísum pørtum av virkseminum hjá Fróðskaparsetri Føroya.

Stýrið skifti orð um ymisk óheppin viðurskifti, ið deildir, starvsfólk og stýrislimir hava víst á. Í stóran mun er talan um mál, ið taka ov langa tíð at avgreiða, ógreið ábyrgdarviðurskifti ella ógreiðar mannagongdir í sambandi við, at farið er frá eldri skipanum uttan at nýggjar skipanir eru mentar ella hava funnið sína legu. Slíkt er ikki ókent í sambandi við bygnaðarbroytingar.

Í hesum sambandi heitti stýrið á leiðsluna um at styrkja samskiftið við deildirnar og at tryggja, at skipað verða fora, ið kunnu taka slík mál upp og fáa tey ruddað av vegnum. Somuleiðis varð mælt til, at dekanarnir í størri mun enn higartil verða staðsettir á útvaldum deildum heldur enn at hava høvuðssæti á setursskrivstovuni.

Viðvíkjandi ætlanunum um at seta útbúgvingarleiðarar, lestrarráð og at styrkja deildarskrivstovurnar varð nevnt, at heimildar- og ábyrgdarøkini mugu greinast neyvari, soleiðis at tað slepst undan einum tómrúmi, tá ið farið verður frá skipanini við deildarleiðarum. Her vórðu m.a. markamótini millum dekanar og útbúgvingarleiðarar / lestrarráð nevnd og somuleiðis markamótið millum setursskrivstovuna og deildarskrivstovurnar.

Hoyringsfreistin í sambandi við ætlaðu bygnaðarbroytingarnar er sett til 30. september og leiðslan fer tá undir at viðgera innkomnu viðmerkingarnar.

## 7. Status avrikssáttmáli

Avrikssáttmálin tekur lutvíst støði í strategiskjalinum fyri Fróðskaparsetur Føroya 2011-2016, sum var samtykt á stýrisfundi 9. september 2010.

Endamálið við avrikssáttmálanum millum stýrið og leiðsluna er at:

- seta karmar fyri strategisku menningina av Setrinum
- eyðmerkja hvørji mál skulu røkkast og
- áseta hvørjir parametrar ið skulu mátast.

Málsetningar í avrikssáttmálanum eru:

1. Strategiskt ætlanarskjal (víðkað lýsing av avrikssáttmála) skal støðugt dagførast og viðgerast millum starvsfólk á Setrinum og í stýrinum. Strategiska ætlanarskjalið verður grundarlag fyri framhaldandi menning og raðfesting av virkseminum á Setrinum.
2. Felags góðskuskipan fyri undirvísing skal etablerast í 2013. Góðskuskipanin verður grundað í ESG leiðreglum. (LL nr 58, §3 stk. 2)
3. MMR hevur tilnevnt serfrøðingabólk at meta um virksemið hjá Fróðskaparsetrinum, sambært LL nr 58, §3 stk. 3. Fróðskaparsetrið skal fyrireika seg til, at serfrøðingabólkurin fremur metingina við árslok 2014. Ætlan fyri hetta arbeiðið skal leggjast fyri stýrið á stýrisfundi nr. 4. í 2013.
4. Ársætlanir fyri vísindafólk/undirvísarar skulu ásetast í 2013
5. Hagtøl skulu skipast fyri lestrarvirkni og gransking
6. Samskipað lestrarvegleiðing á Setrinum verður skipað í 2013
7. Í 2015 skal talið av fulltíðarlesandi á Fróðskaparsetri Føroya verða komið uppá 800 og upptøkan skal vera umleið 300 pr/ár.
8. Talið av vísindastarvsfólkum (adjunktum, lektarum, professarum) skal fram til 2015 økjast við 1/3 í mun til 2012.
9. Fyrisitingin skal mennast, soleiðis at hon kann átaka sær uppgávur, ið standast av vaksandi virksemi og øktum krøvum til útbúgvingardygd

10. Talið av útgávum í viðurkendum tíðarritum skal áhaldandi økjast. Í 2013 skal neyvt yvirlit gerast yvir vísindaligu framleiðsluni seinastu árini og framsøkin mál setast fyri 2014-2016.
11. Neyvar samstarvsavtalur við samstarvsuniversitet (HÍ, DTU, KU o.o) skulu gerast í 2013/2014
12. Framkomið KT kervi skal etablerast í 2013
13. Lestrarumhvørvið á Setrinum skal støðugt betrast
    a. Eitt felags ráð teirra lesandi á Setrinum skal skipast
    b. Umstøður fyri felags virksemi skal styrkjast í 2013
14. Arbeiðsumhvørvið á Setrinum skal støðugt betrast, við støði í trivnaðarkanningini frá 2012.
15. Ársrit skal gerast á hvørjum ári
16. Bólkur setast við ársbyrjan 2013 at gera uppskot um framtíðar universitetscampus. Arbeiðsætlan skal latast stýrinum við ársenda 2013
17. Eftirútbúgvingartilboð skulu skipast eftir felags leisti í 2013 (inntøkufíggjað virksemi).

18. Nýggjar útbúgvingar:

| Nýggjar útbúgvingar | Stig |
|---|---|
| 2013 | |
| Løgfrøði | master |
| Vegleiðaraútbúgving | master |
| Orku- og umhvørvisverkfrøði | bachelor |
| 2014 – 2015 | |
| Politikkur og umsiting (samfelagsvísindalig) | master[1] |
| Smátjóðir og altjóðagerð (søguvísindalig) | master[1] |
| Sosialvísindi og samfelagsplanlegging (samfelagsvísindalig) | master[1] |
| Burðardygg samfelagsmenning/small states (Nordic master) | master[2] |
| Heilsuvísindi (byrjar sum stakskeið) | master |
| Almannafyrisiting (verður í dag bjóðað sum diplom) | bachelor |
| Fjølmiðlafrøði | master |
| KT-verkfrøði | master |
| Fiskivinna og aling | master[3] |
| Pedagogikumútbúgving | |
| Matfrøðiútbúgving | |
| Búskaparfrøði | bachelor |
| Diplom í føroyskum fyri útlendingar | master |

[1] Hesar útbúgvingarnar krevja, at tann lesandi tekur ein part av útbúgvingini sum skiftislestur á øðrum universiteti.
[2] Útbúgvingin er sonevnd Joint Nordic Master útbúgving, boðin út í samstarvi við universitet í Grønlandi, Íslandi og Noregi.
[3] Útbúgvingin verður boðin út sum fjarlestur í samstarvi við onnur universitet, har Setrið letur ein part av undirvísingini.

| | |
|---|---|
| List/tónleikur/kreativitetur | bachelor |
| 2015 – 2018 | |
| Læknavísindi | bachelor |
| Ítróttur og rørsla | |

Leiðslan á Setrinum setir seg í samband við Mentamálaráðið viðvíkjandi ætlanunum av skipa pedagogikumútbúgving á Námsvísindadeildini.

Stýrisformaðurin og rektarin staðfesta avrikssáttmálan.

## 8. Status – strategi

Arbeiðsútkast av strategiskjalinum varð lagt fram til kunningar og viðmerkingar. Strategiskjalið er nakað drúgt og skal redigerast, áðrenn tað verður sent til innanhýsis hoyring á Setrinum.

Semja er um, at uppskotið er á einari góðari leið. Serliga er tað gott, at dentur er lagdur á at forankra strategiina í føroysk viðurskifti. Leiðslan arbeiðir víðari við at orða strategiina lidna, soleiðis at uppskotið kann sendast í hoyring.

## 9. Meting av Setrinum – kunning

Mentamálaráðið hevur sett niðanfyristandandi at eftirmeta Fróðskaparsetrið.

- Linda Nielsen, professor, dr. jur. Københavns Universitet
- Jón Torfi Jónasson, professor, ph.d., Háskóli Íslands
- Juerg Glauser, professor, Universitetet i Zuerich

Fundur er avtalaður í Mentamálaráðnum mánadagin 30. september, har landsstýrismaðurin og umboð fyri ráðið saman við umboðum frá Setrinum hitta eftirmetingarpanelið. Á fundinum verða uppgávurnar hjá panelinum lagdar fram.

Eftirmetingarpanelið kemur á vitjan á Setrinum týsdagin 1. oktober kl. 9, har tey fáa høvi at vitja á øllum deildum Setursins.

### a. Góðskutrygging

Arbeiðið við at greina hvussu eina felags góðskutryggingarskipan kann mennast er byrjað. Uppskot til hvussu arbeiðast skal víðari verður lagt fyri leiðsluna í næstum.

## 10. Starvssetanir – kunning

- Móðurmálsfrálærufrøði (NÁD) (er sett)
- Enskum/fremmandamálsfrálærufrøði (NÁD) (er sett)
- Námsfrøðilig leiðsla (NÁD) (er sett)

- Støddfrøði (NÁD) (er sett)
- Lívfrøði (NÁD) (er sett)
- Samfelagsfrøði (SSD) (er sett)
- Samfelagsfrøði (SSD tíðaravmarkað 1 ár) (er sett)
- Samfelagsfrøði (SSD granskingarhjálp 1 ár) (er sett)
- Búskaparfrøði (SSD)
- Orkuverkfrøði (NVD)
- Støddfrøði (NVD)
- KT-verkfrøði (NVD)
- Løgfrøði (SSD)

Størvini innan búskaparfrøði, KT-verkfrøði og støddfrøði eru enn til viðgerðar hjá metingarnevndum. Orkuverkfrøðistarvið er til viðgerðar hjá setanarnevnd, og freistin at søkja løgfrøðistarvið á SSD er ikki úti enn.

Viðvíkjandi størvunum, sum enn ikki eru almannakunngjørd, er ætlanin at kunna á deildunum skjótast til ber.

**11. Upptøka 2013 – kunning**

Fyri aðru ferð var møguligt hjá umsøkjarum at søkja inn til hægri lestur gjøgnum kvotu 2. Í ár varð upptøkufreistin fyri kvotu 2 flutt til 15. mars ( hetta er eisini freistin í Danmark). Umsóknarfreistin at søkja inn eftir kvotu 1 var 1. juli. Boðini um upptøku vórðu (fyri bæði kvotu 1 og 2) send út 15. juli

Upptøkan 2013 verður eftirmett í næstum, men at lítið er at ivast í, at tað riggaði væl at flyta kvotu 2 viðgerðina til marsmánað, tí hetta lætti munandi um hjá upptøkubólkunum.

Tá freistin var úti, vóru tilsamans 378 umsóknir innkomnar. 296 vóru til tær 8 bachelorútbúgvingarnar, meðan 82 vóru til MA-lestur. 119 søktu gjøgnum kvotu 2. Í fjør var talið av umsóknum samanlagt 350 til 10 bachelorútbúgvingar.

Býtið millum útbúgvingarnar, sett upp eftir vali sum fyrsta raðfesting, gjørdist soleiðis:

- 10 Føroyskt bachelor
- 21 Orku- og umhvørvisverkfrøði
- 83 Lærara
- 50 Námsfrøði
- 71 Sjúkrarøktarfrøði
- 30 Sosialvísindi og samfelagsplanlegging (samfelagsvísindi)
- 16 Politikkur og umsiting (samfelagsvísindi)
- 15 Smátjóðir og altjóðagerð (søguvísindi)

- 29 Master í løgfrøði
- 5 Master í føroyskum
- 48 Master í vegleiðing

**12. Ymiskt**

**b. Ráð teirra lesandi / MFS**

Reglugerð fyri Ráð teirra lesandi er orðað og undirskrivað. Val í ráð teirra lesandi verður skipað í døgunum 23. og 24. oktober á deildunum.

Uppskot til reglugerð fyri akademiskt ráð verður lagt fram á næsta stýrisfundi.

Næsti fundur verður **mikudagin 27. november 2013**

Fyrisitingarstjórin

Skjøl:

- Frágreiðing frá fíggjarleiðaranum
- Yvirskipað strategiskjal
- Fundarfrágreiðing 2-2013
- Avrikssáttmáli